

## Knud Rasmussen í Vestmanna

Vestmenningar hava fingið við upp í bátastevnuskránna, at nýggja danska sjóverjuskipið Knud Rasmussen (mynd) fer at liggja við bryggju í Vestmanna leygardagin millum klokkan 12 og 14. Tá verður høvi hjá fólki at vitja umborð og síggja skipið. Sjóverjuskipið var fyrr í vikuni á Miðvági, men legði ikki til bryggju. Seinni sama kvøld var skipið at síggja í Vestmanna, og týsdagin kom ein lastbilur hjá donsku verjuni til Miðvágs við eini minu, sum skal setast upp á Krígssavninum í Vágum. Minan var tó óskaðilig. Myndin av Knud Rasmussen, sum vit prenta saman við hesum stubba, er tikin á Skálafjørðinum týsdagin, tá skipið sigldi aftur og fram har.




Hetta er í hvussu er eitt talandi dømi um, hvussu netini millum bátar og millum bátar og bryggju ella brúgvar IKKI skulu nýtast
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Myndin er tikin á bátastevnu í fjør, tá allur riðilin av bátum stevndi inn á Vestmanna*

# Fjølbroytt skrá fyri bátastevnuna 2009

**Stórur bátastevnudansur verður í ítróttarhøllini í Vestmanna leygarkvøldið, har vestmannabólkarnir, Thunderbirds og Vestmenn, spæla. Skipað verður fyri koyring við náttarbussi millum Vestmanna og Havnina, har fólk eisini sleppa heimaftur eftir dansin**

VESTMANNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hæddarpunktið á bátastevnuni, sum verður í Vestmanna leygardagin, er sjálvsagt løtan, tá siglt verður inn á Vestmanna, og bátarnir verða bundnir við brúgvarnar.

Eins og undanfarin ár savnast bátarnir, sum verða við í siglingini, við Fútaklett undir Vágalandinum. Gamli postbáturin Ólavur tekur ímóti, og klokkan 14.30 verður tað skiparin á Ólavi, sum skipar fyri siglingini inn á Vestmanna.

Umleið ein tíma eftir, at bátarnir hava sett kós inn á Vestmanna, er væntandi, at allir eru komnir inn móti bryggjuni og brúgvunum, har bátsmanningarnar eisini fáa vegleiðing um, hvussu bátarnir skulu leggjast.

Við atkomuna verður høvi hjá bátafólki at keypa sær trygdarnet, sum skal spennast millum bátarnar fyri at tryggja, at fólk ikki detta niður ímillum.

Eftir at bátarnir eru bundnir, og fólk samstundis eru komin til bygdar í húsvognum, á motorsúklu ella á hestbaki, verður um 15.30-tíðina høvi at vitja innar í tjaldið, har gestirnir fáa feska suppu og annað leskandi. Tá kunnu gestirnir eisini bíleggja sær morgunbreyð, sum síðan verður borið út morgunin eftir.

Áðrenn vit fara víðari við sjálvari skránni, kunnu vit leggja aftrat, at vaktar-og hjálparskipið Tjaldrið ella Brimil fylgja bátum, sum fyrr um dagin leita sær suður um Glyvursnes við kós móti Vestmanna.

### Staðið og Bryggjan

Klokkan 13-19 leygardagin verða tvær áhugaverdar framsýningar í Vestmanna, báðar á Staðnum. Onnur verður við modellum av gomlum vestmannaskipum, sum Finnbogi Christiansen hevur gjørt. Hin er ein framsýning við gomlum myndum úr Vestmanna, og her er tað Helgi Jacobsen, tíðindamaður, ið skrivar søgu um Vestmanna, sum sýnir fram.

Eitt annað tiltak, sum er á skránni tíðliga leygardagin, er, at Café Bryggjan vísir fótbóltsdyst millum Manchester United og Arsenal á stórskíggja. Hesin dystur verður sýndur klokkan 12.45.

Millum klokkan 16 og 19 verður tivoli í ítróttarhøllini við eitt nú fiskibrunni, bóltkasti við ferðmátara, hoppiborg, tombola, kaffisølu og lutaseðlasølu.

Klokkan 18 byrjar søla av grillaðum og vælumtóktum bátastevnubúffum á havnalagnum, og klokkan 19-21 syngja og spæla Sámal Ravnsfjall og Jóan Jakku Guttesen á havnalagnum.

### Náttarbussur

Úr skránni leygarkvøldið kann annars nevnast, at fýrverk verður skotið klokkan 24, eftir at felagssangur er liðugur.

Stórdansurin í ítróttarhøllini byrjar klokkan 23, har vestmannabólkarnir, Thunderbirds og Vestmenn spæla, og her verður 18 ára aldursmark.

Skipað verður eisini fyri koyring við náttarbussi, sum fer úr Vestmanna klokkan 21.30 og 23.30 - og úr Havn til Vestmannar klokkan 22.30 og 00.30.

Koyrt verður úr aftur Vestmanna eftir dansin.

Sunnudagin verða eisini tiltøk á skránni, og tá verða framsýningarnar á Staðnum við modelskipum og gomlum myndum úr Vestmanna uppafturtiknar.

Framsýningin við modelskipum letur upp klokkan 12, og framsýningin við gomlum myndum klokkan 15. Báðar hava opið til klokkan 18 sunnukvøldið.

### Dreingir og gentur

Vestmenningar hava mannað 5. mannafarið Havfrúnna við dreingjum og gentum í summar, og 6. mannafarið Furtúna er mannað við monnum. Haraftrat fer Havfrúgvin eisini at luttaka í barnaróðrum í summar.

-10. mannafarið Vestmenningur er tíverri ikki mannaður í summar, tí menn, sum hava róð við bátinum, ynsktu at hava frí frá kappróðri í summar. Vit vóna tó, at báturin verður mannaður aftur næsta kappingarár, sigur Bárður Nielsen.